Kostnaður: Vaksin kr. 100,- Børn: ókeypis

NEISTIN

# Evropa Cup dystur

LEYGARDAGIN 10. SEPTEMBER KL. 19 Í HØLLINI Á HÁLSI



NEISTIN vs CLUB SPORTIV MUNICIPAL PLOIESTI

Neistin CSM Ploiesti

WOMEN'S EHF CUP

# Góðu **áskoðarar**

Hjartaliga vælkomin til Evropa Cup dyst millum Neistan og CSM Ploiesti úr Rumenia. Neistakvinnur er nógv mest vinnandi lið í føroyskum kvinnuhondbólti, við ikki færri enn 41 meistaraheitum.



Súna Mørk, forkvinna

Hóast møguleiki hevur verið á nærum hvørjum ári at fara út í Evropu at spæla, eru heili 30 ár síðani Neistakvinnur seinast spældu Evropa Cup dystir.

Nú er loksins aftur møguleiki hjá Neistakvinnum at royna seg, og hóast hettar er ein stórur biti at gloypa, taka vit av avbjóðingini við góðum treysti.

Hugaligt er at síggja at fleiri av okkara ungu klára seg væl, tá farið verður út um landoddarnar í landsliðshøpi. Tað verður nú eisini stuttligt at síggja, hvussu føroysk feløg klára seg í evropa.

At taka stigið og fara út í Evropa at spæla er eitt upplivilsi fyri leikararnar, at bjóða av og royna seg móti sterkum liði og leikarum úr øðrum londum.

Ynskiligt hevði verið at fleiri feløg tóku stig til at luttaka í Evropa Cup, men tíverri er kostnaðurin ofta ein forðing.

Eg havi í míni tíð havt nógvar ymiskar leiklutir í Neistanum. Fyrst sum leikari síðani foreldur, venjari, seinnu árini í nevnd og seinasta árið sum forkvinna í felagnum.

Allir leiklutir eru umráðandi, eingin meiri umráðandi enn annar.

Í einum stórum felagið sum í Neistanum skulu nógvar hendur til fyri at lyfta, og skal alt hepnast má lyftast í felag.

Nevndin vil takka fyri hollan stuðul frá stuðlum og øllum teimum mongu Neistafjepparunum sum gera mun tá á stendur, og taka hond í við felagsabeiðinum.

Við stórum bláum hjarta gleði eg meg til Evropa Cup dystirnar, og vóni at hesir fara at geva okkara spælarum, fjepparum og stuðlum eina góða uppliving og vera føroyskum hondbólti at frama.

Vit vóna at síggja nógv hondbóltsáhugaði í høllini til dyst.

Fyrri Evropa Cup dysturin verður leiktur í Føroyum leygardagin 10. September kl. 19 í Høllini á Hálsi, meðan seinni dysturin verður leiktur í Ploiesti, Rumenia leygardagin 17.september kl. 18.00.

Hjartaliga vælkomin, og góðan dyst!

## Blátt er gott!

SÚNA MØRK,
forkvinna NEISTIN

Nú er loksins aftur møguleiki hjá Neistakvinnum at royna seg, og hóast hettar er ein stórur biti at gloypa, taka vit av avbjóðingini við góðum treysti.




Ætlar tú at selja tíni hús í Havn ?

- vit hava keyparar, ið bíða

INNI

Niels Finsensgøta 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

EVROPA CUP SØGA

# Fingu STÓRAR avbjóðingar

Mótstøðuliðið var í heimsflokki, tá Neistakvinnur í 1979 fyri fyrstu ferð tóku lut í evropisku kappingini fyri meistarar

Í heimligu kappingini hevði Neistin tikist við Kyndil og Stjørnuna, og eftir at tey bæði mótstøðuliðini høvdu argað eitt sindur, settust Neistakvinnur aftur á hondbóltsrtrúnuna í 1978.

At liðið var krútsterkt, var sjálvandi eingin ivi um, men skuldu spælararnir mennast enn meira, máttu nýggjar avbjóðingar til. Hesa vórðu funnar í Evropa, tá Neistakvinnur sum tær fyrstu her heima valdu at tekna seg til Evropisku meistarakappingina.

Mótstøðan fekk valla verið sterkari enn tann sama. KS Ruch Chorzow úr Póllandi hevði árið fyri verið í hálvfinaluni í evropisku meistarakappingini. Tær vóru besta liðið heima í Póllandi, sum á ongan hátt smæddist burtur í altjóða høpi. Hetta árið gjørdist Pólland nummar seks í HM-endaspælinum, og tvey ár frammanundan vann liðið HM-gull, so avbjóðinin hjá Neistakvinnum var øgilig.

## Vandu hart

Við Jørleif Kúrerg sum venjara varð nógv lagt fyri. Kvinnurnar vandu hart og miðvíst. Við Sosialin segði Jørleif undan dystinum, at hansarar lið var sera væl fyri.

– Vit hava gjørt upp, hvussu ofta og hvussu leingi vit hava vant. Vit hava verið 93 ferðir til venjingar og vant í 108 tímar, segði Jørleif, sum annars vónaði, at høllin fór at verða á tremur við áskoðarum.

Ta vónina hevði nevndin í felagnum eisini. Henning Eysturoy var formaður um hetta mundið, og hann segði, at har skuldu einir 1.700 gjaldandi áskoðarar til, um evropiska luttøkan skuldi mala runt fíggjarliga.

Høllin var á tremur, men hóast stuðulin var goður, so var mótstøðan í meira lagi hjá Neistakvinnum. Fyrra dystin vann Ruch ikki minni enn 21-9. Støðan eina løtu í byrjanini var annars 1-1, men eftir hetta sá Neistin ikki aftur í halaferðina á pólska liðnum. Merkisvert er annars, at Rannvá Hanusardóttir skeyt ikki færri enn átta av teimum níggju málunum, sum Neistin fekk í dystinum. Hitt málið skeyt Torgerð Klein.

## Betri seinna dystin

Virðingin fyri mótstøðuni hevði helst verið í meira lagi, og hóast Ruch eisini vann sannførandi í seinna dystinum, var spælið hjá Neistanum nú væl betri. Neistin var enntá á odda 2-1, og tær javnaði eisini til 3-3, áðrenn mótstøðan leyp avstað. Endaliga úrslitið av seinna dystinum varð 23-17. Málskjúttar hendan seinna dystin vóru Rannvá Hanusardóttir 4, Ruth Róin 3, Marita Arge 3, Helena Øster 3, Ruth Sundstein 2, Rita Poulsen 1, Ingun Larsen 1. Eisini gjørdi Dagblaðið nógv burtur úr teimum báðum dystunum, og ikki minst hevði blaðið stórar rósur til Óluvu Joensen, sum saman við Vár Michelsen var í Neista-málinum.

Tað hoyrir við til søguna, at pólsku gestirnir steðgaðu longri á í Føroyum, enn tey í Neistanum høvdu ætlað. Við Sosialin segði Henning Eysturoy, at eitt bræv frá mótstøðuni hevði tikið sera drúgva tíð um at finna vegin til Føroya. Í brævinum stóð, at liðið steðgði eina lítla viku í Føroyum. Hetta vóru tveir dagar fleiri, enn tey í Neistanum høvdu ætlað, og hetta viðførdi eisini eyka útreiðslur. Hinvegin gav hetta eisini møguleika fyri einum framsýningardysti, har Ruch spældi móti føroyskum útvalsliði. Ein dystur, sum Ruch vann 23-16.

Tær, mannaðu liðið hjá Neistakvinnum til evropisku dystirnar í januar í 1979, vóru Vár Michelsen, Óluva Joensen, Marita Arge, Ingun Larsen, Rita Poulsen, Sonja Jørgensen, Ruth Róin, Ruth Sundstein, Malan Mohr, Helena Øster, Rannvá Hanusardóttir og Torgerð Klein.

## Tríggjar aðrar royndir

Í 70'unum og 80'unum vann Neistin ikki færri enn 17 av 20 møguligum meistaraheitum. Tí var kanska ikki løgið, at leitað varð eftir altjóða avbjóðingum, men hinvegin hava hesar avbjóðingar ivaleyst eisini gjørt sítt til, at liðið var somikið einaráðandi.

Í 1980 tók Neistin aftur lut í Evropa Cup. Hesa ferð var mótstøðan íslendsk, tá Fram kom hendanvegin.

Fram var kanska ikki heilt so sterkt sum pólversku meistararnir, sum fyrr høvdu vitjað, men framvegis gjørdist talan um tryggan sigur til gestirnar. Fram vann nevnliga teir báðar dystirnar 13-6 og 17-4.

Eisini í 1982 tóku Neistakvinnurnar altjóða dystin upp. Hesa ferð var tað norska Skjeberg, sum var á vitjan.

Tað byrjaði væl, og Neistin var á odda bæði 1-0 og 2-1, men so steðgaði av álvara upp. Kropssterka norska liðið vant burtur úr

bláa heimaliðnum, sum at enda tapti 24-11. Sosialurin skrivar, at Neistakvinnurnar einki stóðu aftan fyri tær norsku í bóltførleika, men kropsliga var styrkismunurin stórur, og at tað var hetta, sum var heilt stóri munurin í dystinum.

Fjórða og higartil seinasta royndin hjá Neista-kvinnum í Europa varð gjørd í 1986, tá svenska Irsta HF var mótstøðuliðið. Nakrar av teimum, sum spældu fyrstu evropisku dystirnar í 1979 vóru framvegis at síggja á liðnum, men eisini vóru fleiri nýggj andlit at síggja á liðnum, sum í heimligu kappingini var mest sum einaráðandi.

Í dystarfrásøgnini eftir dystin skrivar Dagblaðið, at spenningurin var stórur fyrstu 40 minuttirnar ella so av fyrra dystinum.

Í Hálvleikinum var munurin bara tvey mál, og tá Neistin alt fyri eitt minkaði um munin eftir steðgin, kom veruligur spenningur. Rannvá Hanusardóttir hevði møguleikan at javna, men hon brendi brotskastið, og so skrædnaði av álvara. Dysturin endaði ikki minni enn 21-11. Seinna dystin vann svenska liðið 22-15, eftir at tað í hálvleikinum sóð 9-7. Svanna Hanusardóttir vísti satt stórspæl, og hon skeyt ikki færr enn 10 mál í seinna dystinum.

*Skrivað: Jákup Mørk*



*Myndin var at síggja í Dagblaðnum 24.januar 1979. Strikuspælarin og Neistakvinnan Rita Berg er farin í skjótálop*













Faroe Ship er størsta inn- og útflutningsfyritøka í Føroyum. Umfatandi rutunetið hjá Faroe Ship um allan heim tryggjar hvørja viku føroyingum vøru á hyllarnar og føroysku fyritøkunum skjótan og góðan flutning á útlendsku marknaðirnar.

Faroe Ship veitir alt slag av flutningi - í bingjum, leyst góðs á plattum og stóru serflutningarnar, sum krevja nógv pláss umborð á skipunum.
Fleiri enn 30 bilar hjá Faroe Ship flyta góðsið á rætta stað.

FAROE SHIP



# Neistin út í Evropa

Neistin, ið so mangan hevur gingið undan, tá um føroyskan kvinnuhondbólt ræður, leggur nú aftur ein stein á varðan hjá føroyskum hondbólti. Greipuvinnararnir síðstu tvey árini hava meldað liðið til EHF Cup-kappingina í kvinnuhondbólti, og nú er so fyrri dysturin á skránni á heimavølli.

Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn, sum hevur verið karmur um allarflestu stórhendingar í føroyskum hondbólti, leggur sjálvandi gólv til eisini hesa avbjóðingina hjá Neistanum. Tó eru umstøðurnar eitt sindur øðrvísi og heldur meira rokaligar, enn tær plaga at vera, tí her er alt meira ella minni eitt byggipláss, nú høllin verður bygd út.

Kortini vænti eg, at trúgvu heimaáskoðararnir hjá Neistanum fara at bera yvir við, at umstøðurnar hesaferð ikki eru so slættar og snøggar, tær onkuntíð hava verið, tí vit síggja øll fram til endaliga úrslitið av tí arbeiði, sum er í gongd. Og lítil ivi man vera um, at ikki minst Neistin fer at fáa góðan ágóða av komandi dupulthøllini við øllum teimum hentleikum, hon kemur at hava við sær.

Her og nú er tað Evropiska avbjóðingin, sum tað fyrst og fremst snýr eg um, og har vita vit, at bláu fyrireikingarnar altíð eru so góðar, sum tær kunnu verða tað. Og eisini vita vit, at kvinnurnar hjá Neistanum fara inn á vøllin at stríðast og gera sítt besta – sum vit kenna tær frá heimligu kappingini – og hóast seinasta Evropiska kapping hjá Neistakvinnum var í 1986, sæst neyvan rustur á...

Mótstøðuliðið hesaferð er eitt av frægaru liðunum í rumenskum hondbólti, CSM Ploiesti, sum bleiv nummar seks í rumensku kappingini síðsta kappingarár. Óivað ein stórur biti, men als ikki ómøguligur, nú Neistin hevur heimadyst fyrst og við einum góðum úrsliti kann vinna sær gott útgangsstøði undan seinna dystinum næsta vikuskifti.

Kvinnurnar hjá Neistanum hava so mangan víst, hvør dugur er í teimum, og við 41 meistaraheitum í viðførinum er bláa liðið væl brynjað til eisini hesa Evropisku avbjóðingina, sum vit gleða okkum til. Vit hava góðar vónir um, at væl fer at gangast og gleða okkum!

Koyr á, Neistin!

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu



**Orkulán frá Norðoya Sparikassa kann veitast til:**

- at skifta vindeygu
- at skifta tekju ella klædning
- at bjálva bústaðin
- nýggja ella alternativa orkuskipan
- onnur orkusparandi tiltøk

Bílegg eitt kundaprát
og fá meira at vita um fyrimunirnar
við orkuláninum.

*Norðoya Sparikassi Miðlon Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 Fax 47 6015 ns@ns.fo www.ns.fo*

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

110ÁR
BYGMA
1906-2016 BALSLEV

# Sterk hondbóltstjóð

Tað er avmarkað, hvat vit vita um komandi mótstøðulið, nú Neistakvinnur aftur skulu royna seg í altjóða høpi.

Rumenska CSM Ploiesti gjørdist í fjør nummar seks í heimligu kappingini, men hóast tær soleiðis endaðu uttan fyri heiðursmerkjarøðina, er eingin sum helst ivi um, at talan er um sterkt lið.

Rumenskur hondbóltur hevur í nógv ár havt eina stolta siðvenju. Ikki minst á kvinnusíðuni, har tær so seint sum í fjør vunnu bronsumerki í HM-kappingini. Í OL í ár endaðu tær sum nummar níggju av luttakandi tjóðunum.

Lítil ivi man vera um, at spælistílurin framvegis er eyðkendur við krossandi bakkum, har spælt verður upp til skot útifrá, samstundis sum kontrafasan kann roknast við at verða sera sterk.

Ítróttarligu vónirnar hjá okkum eru tí ikki fyrst og fremst at koma víðari. Heldur verður talan um risa hondbóltsuppliving, har Neistakvinnur loksins aftur fáa møguleikan at spæla móti avgjørdum toppspælarum, og á tann hátt kunnu fáa lærdóm til víðari hondbóltsferðina.

Hartil ræður sjálvandi um, at kvinnurnar hjá okkum gjøgnum samfullar 60 minuttir vísa tann sterka hugburð, sum seinnu árini hevur borið okkum somikið langt. Viljin at stríðast, og evnið til ongantíð at geva upp hava verið eyðkenni hjá liðnum, og hetta eru lívsneyðugar dygdir, um vit skulu síggja eitt gott avrit – og úrslit – frá okkara liði.

Í mun til í fjør, so er bulurin á liðnum framvegis hin sami. Nico er givin við hondbólti í fremstu røð, men ivaleyst er hon kortini ein stuðul, tá vitan um mótstøðuliðið skal savnast.

Hinvegin hevur hópurin eisini fingið tilgongd. Bára Hansen hevði í fjør barnsburðarfarloyvi, men hon er nú aftur at síggja á vøllinum, og eisini eru trý spennandi nøvn togað upp úr ungdómsrøðum okkara. Nevnliga Tórhalla Thorsteinsson, Rannvá Dahl og Fríða á Dunga.

Og so er venjarin sjálvandi eisini nýggjur. Í felagnum eru vit sera spent uppá, hvat Danilo Gagliardi hevur at tilføra liðnum. Kanska er frumframførslan ein stórur gloypibiti hjá nýggja venjaranum, men eingin ivi er um, at Danilo fer at nýta sterku mótstøðuna sum barometur fyri, hvussu spælararnir reagera undir trýsti.

Tí tað er eingin ivi um, at trýstið verður stórt. Vit kunnu rokna við at síggja á høgum altjóða støði, og spennandi verður at síggja, hvussu verður við til at lyfta lið okkara móti framtíðar avbjóðingum.

*Skrivað: Jákup Mørk*







ONKI SUKUR
ONGAR KALORIUR
ONKI LITEVNI
ONKI FJAS

TAÐ REINA FØROYSKA
Føroya Bjór
Vatn
GÓÐSKA SÍÐAN 1888

AQUA

VEST PACK

# VEST PACK

*...meira enn pakkitilfar!*

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakki-maskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin víða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat víðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

**FO-350 Vestmanna · Tel 42 41 07 · www.vestpack.fo**

# Góðu Neistar

## – Góða eydnu í Evropa



Tey, sum fylgja við í fótbólti munnu ofta hava hoyrt, at vónirnar hjá fremstu liðunum er at kvalifisera seg at koma í Evropa.

Hondbóltur er hin stóra líðítróttagreinin í Føroyum og í Havn. Vit minnast enn hvussu spennandi tað var, tá ið Neistin vann FM í kvinnuhondbólti í fjør. Øll Havnin var blá. Og fjølmiðlarnir gjørdu sítt til at varpa spenningin út millum allar føroyingar. Tá kvalifiseraðu Neistakvinnurnar seg til Evropa. Men hondbólturin hevur ikki verið eins ágrýtin og fótbólturin at menna seg í altjóða dysti og kapping. Tað er rárasta hending, at føroyameistararnir í kvinnuhondbólti taka lut í árligu Evropa Cup kappingini. So hetta er dagur í viku. Og vit gleða okkum.

### 41 FM heiti, men bert fýra ferðir í Evropa

Kvinnurnar hjá Neistanum hava seinastu 73 árini vunnið 41 føroyameistaraheiti. Ikki eiti á avrik, kanska heimsmet. Men bert fýra ferðir áður hava Neistakvinnur tikið lut í Evropa Cup kapping, fyrstu ferð í 1979 og seinast í 1986. Og sum eg havi skilt, hevur føroyskt kvinnulið einans 9 ferðir tilsamans spælt evropa-cup dystir. Seinast í 2014, tá ið Kyndil spældi móti Femina Vise úr Belgia.

Tað er tí við serligum spenningi, at vit í dag møta til dyst í millum kvinnurnar hjá Neistanum og CSM Ploiesti, sum varð nummar seks í rumensku kappingini í fjør.

### Tøkk til Neistan fyri dirvi og áræði

Vegna Tórshavnar Býráð vil eg fegin takka Neistanum hjartaliga fyri, at tit taka hetta djarva stig. Tí tað eru altjóða avbjóðingar, sum kunnu lyfta kvinnuhondbóltin enn longur fram. Vit vita, at avbjóðingin er stór, tí í hondbólti fylgja eingir evropeiskir pengar við. Tað er sostatt felagið sjálvt, sum skal útvega fíggingina. Og kenni eg Neistan rætt, so verður tað ikki tikið frá barna- og ungdómsarbeiðinum.

Neistin er eitt felag, sum vit Havnafólk eru errin av. Neistin hevur altíð verið undangongufelag, og ein sjónligur og týdningarmikil leikari á vølli og í býnum í 85 ár.

Vegna Tórshavnar Býráð vil eg eisini fegin takka Neistanum fyri tað stóra arbeiði, felagið ger fyri børn, ung og yvirhøvur fyri okkum øll. Tað kann ongantíð virðismetast nóg høgt.

Og vit fegnast um, at umstøðurnar at íðka hondbólt og annan ítrótt her á Hálsi verða munandi betri næsta ár, tá ið høllin verður dupult so stór.

### Vælkomin Danilo Gagliardi

Á odda fyri Neistakvinnurnar stendur nýggi brasilski venjarin Danilo Gagliardi. Og vilja vit eisini nýta høvi at ynskja honum hjartaliga vælkomnum til Neistan og til Havnar. Tað verður spennandi at síggja, hvat brasilskur íblástur kann geva føroyskum hondbólti.

### Góða eydnu í Evropa

Við vón um ein góðan hondbóltsdyst í dag og seinni í Rumenia, vil eg vegna Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs ynskja Neistanum góða eydnu í Evropa.

HELENA DAM Á NEYSTABØ
forkvinna í mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs

Tað er rárasta hending, at føroyameistararnir í kvinnuhondbólti taka lut í árligu Evropa Cup kappingini. So hetta er dagur í viku. Og vit gleða okkum.




Danske Spil

Til gleði og gagns

Tú kann keypa og spæla við á danskespil.dk ella á einum av sølustøðunum kring landið.

# Skulu *gleða* seg til næstu venjingina

Scott Harrington er á øðrum ári í starvi sum hondbóltsmennari hjá Neistanum. Eitt starv, fyrikomandi bretin veruliga brennur fyri. Málið er, at børnini skulu brenna eins nógv fyri hondbóltinum, sum Scott sjálvur ger



Scott Harrington

Sum liður í støðugu menningini av felagnum valdi Neistin í fjør at seta Scott Harrington í starv sum hondbóltsmennara.

Scott er breti, men hann hevur nomið sær venjaraútbúgving í Danmark. Hetta tí hann var partur av hópinum, sum skuldi taka lut í OL í London í 2012. Enskur hondbóltur hevur ikki verið serliga høgt í metum, og tí vórðu 12 spælarar av teimum, sum í 2006 mannaðu enska U19 landsliðið sendir til Danmarkar. Sjálvur varð Scott skaddur, tá hann varð í Danmark, og tí gjørdist talan ikki um nakra OL-luttøku hjá honum. Ístaðin gagnnýtti hann uppihaldið í Danmark til at nema sær venjaraútbúgving.

Henni er tað nú Neistin, sum hevur gleði av, og júst gleðin við hondbóltsspælinum er nakað, sum Scott raðfestir sera høgt í sínum arbeiði.

– Málið hjá mær er altíð, at spælararnir skulu hava hug at koma aftur til næstu venjing. Tað gera børnini, um tey føla, at tey læra nakað, og um tey hava stuttligt.

– Tá vit tosa um børn og ung, so er júst stuttleikin við hondbóltsspælinum nógv tað týdningarmesta. Vit í felagnum skulu royna at skipa venjingarnar soleiðis, at børnini altíð hava venjingar, sum hóska til teirra støði. Megna vit tað, so megna vit eisini at geva teimum øllum nakrar góðar upplivingar við hodbóltinum, heldur Scott.

Hann vísir treytaleyst á, at tá vant verður við ungdómi, eigur fokus als ikki at liggja á sjálvum úrslitinum.

– Vit skulu læra børnini at elska hondbóltsspælið. Sjálvandi dámar bæði okkum venjarum og børnunum væl at vinna. Men vit mugu ikki gloyma, at ein stór orsøk til, at børnini spæla hondbólt, er tí tey vilja vera saman við sínum vinum. Tey vilja hava tað stuttligt, og ta gleðini mugu vit ikki oyðileggja við stutskygdum ætlanum um sigrar fyri ein og hvønn prís.

– Veruleikin er jú eisini, at tú ikki veitst, hvør verður ein stórur profilur sum 20 ára gamal ella gomul. Tú sært avgjørt, at nøkur eru sera væl fyri, men veruleikin vísir eisini, at tað so langt ífrá altíð er tey, ið eru mest eyðsýnd sum børn, sum gerast berandi spælarar í vaksnamannadeildini. Sjálvur royni eg eisini í størri mun at hyggja eftir motivatión, viljanum til at arbeiða hart og viljanum til at mennast, tá eg havi við ungar spælarar at gera.

– Eg haldi í øllum førum, at eitt klassiskt mistak hjá nógvum venjarum er, at tey nýta sera nógva orku til at venja tey, sum skara framúr í barnaárunum. Her í Neistanum royna vit hinvegin at skapa eitt venjingarumhvørvi, har øll børnini verða eins nógv vird, og har øll fáa eins góða venjing. Kunnu vit halda flest møguligum spælarum til longst gjørligt, er í øllum førum meira sannlíkt, at vit hava gott fólk at seta við í vaksnu røðunum.

– Av tí sama royni eg eisini altíð at skipa venjingarnar soleiðis, at tað er tekniskur og kropsligur førleiki, sum er í fokus. Børnini skulu hava bóltin í hondinin at kalla alla tíðina, tí tað er jú tað, sum er tað stuttligasta við spælinum. Eg veit væl, at talan er um liðítrótt, har ávísar reglur galda fyri liðið. Men tað er umráðandi, at øll venjing ikki druknar í taktikki og fyrilestrum um rennibanar. Tað skulu vit nokk klára at læra tey, tá tann tíðin kemur. Men hevur tú ikki teknisku og kropsligu førleikarnar í lagi, tá kemur upp í vaksnu røðirnar, er ofta ov seint at læra seg hesar, og tí verður tann parturin raðfestir sera høgt undir okkara venjingum, sigur Scott.

*Skrivað: Jákup Mørk*



STUÐLAR HJÁ UNGDÓMINUM
Roknskaparfelagið Tryggingarfelagið Føroyar Balslev G-cargo Januar Berg Hestar Ransin málarameistari
Skyn Reynservice Gasssølan BR-leikur Húsavarðartænastan Bowlinghølliin

NordikSOLO 18+

Kom best frá byrjan tá tú fert solo



BANKNORDIK

Til tín millum 18–28 ár

NordikSolo er til tín, ið er lesandi, til tín, ið flytur heimanifrá fyri fyrstu ferð, og til tín, ið flytur uttanlands. Vit bjóða øllum okkara NordikSolo-kundum tær bestu fíggjarligu umstøðurnar.

Tá tú gerst NordikSolo-kundi, fært tú samstundis atgongd til Solopakkan við nógvum ókeypis tænastum, góðum rentum og 20% í avsláttri av tryggingum.

Les meira um tínar fyrimunir á
www.banknordik.fo/solo

SENDISTOVAN

FAXE KONDI

BÚSETUR

Vit hava førleikar og royndir at gera alt bygningsarbeiði innan umvæling, bjálving og nýbygging

– og so eru vit hollir í ráðum

Búsetur spf. | Varðagøta 59 | 100 Tórshavn | Tel +298 355 830 | Far +298 210 830 | Fax +298 310 842 | busetur@busetur.fo | www.busetur.fo



# Neistin


Fríða Petersen, nr. 1


Margit Weihe Fríðmundsdóttir, nr. 12


Marjun F Danberg, nr. 10


Birita Jacobsen, nr. 4


Jacklin Durhuus Jógvansdóttir, nr. 77


Eir M Berg, nr. 5


Drós Ragnarsdóttir, nr. 8


Tórhalla Thorsteinsson, nr. 17


Brynja Høj, nr. 13


Bára Hansen, nr. 9


Barbara N Johannesen, nr. 7


Súsanna P. Nólsoy, nr. 2


Lilja Mohr, nr. 3


Rannvá Dahl Hanusson, nr. 6


Fríða á Dunga, nr. 14


Danilo Gagliardi Junior, venjari


Scott Harrington, venjari


Erikur Magnussen, liðleiðari

STUÐLAR HJÁ KVINNUNUM ERU:
Ford INNI Flog.fo Bailine Yndi Arktitektar99 Skyn Berg Hestar Poul Hansen Okkara Faroe Agency,




# CSM Ploiesti

| LEIKARI | NR. |
|---|---|
| Apetrei Oana-Valentina | 23 |
| Balaban Daciana Carmen | 9 |
| Bozovic Ivana | 4 |
| Carasol Alexandra | |
| Chiricuta Andreea Elisa | |
| Dinu Greta Ionela | 5 |
| Dmitrovic Marina | 99 |
| Dumitru Alina | |
| Farcau Ramona Petruta | 17 |
| Gheorghe Carmen | 22 |
| Mitrescu Izabela | |
| Parvut Aneta | 2 |
| Serban Elena | |
| Shutska Iryna | 7 |
| Tatalovic Dragica | 26 |
| Tivadar Maria Mihaela | 11 |
| Tudor Nicoleta | 26 |

**VENJARI**

Hrupec Neven




**Vit umboða hesi merki**

Cummins – Bátamotorar

3M PELTOR – Oyravernd

EXIDE – Akkumulatorar

Fronius – Sveisiútgerð, elektrodir, gass

Mobil – Smyrjiolja

Dräger – Filtur, maskur og gassmátarar

Crewsaver – Solas góðkendir bjargingarvestar og draktir

DSB RFD – Bjargingarbátar

Mullion – Flóti og yvirlivilsisdraktir

- Oljuklútar
- $CO_2$ og onnur køligass
- Sløkkiútgerð og tænasta

**Fønix**

Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

JACOBINA HÁRFRÍÐKAN
21 30 21



# FYRR og NÚ!

28.november í 1965 kom eg til Havnar um kvøldið við Tjaldrinum í einum kavaroki, sum var so tætt, at vit vistu ikki, hvar vit vóru, fyrr enn vit byrjaðu at leggja at kai. Síðan havi eg búð her, undantikin nøkur uppihald uttanlands innímillum. Summarið eftir – í 1966 – fór eg at spæla við Neistanum, tá spældi mann hondbólt uttandura – og um summarið.



Hans Holm hevur taktikprát við Neistakvinnur áðrenn dyst móti landsliðkvinnum, stóð at lesa í Dagblaðnum 1979

Tað sigur eitt sindur um støðuna í vaksnamannadeildini í felagnum, at eg kom á 1.lið, og at 1.kvinnulið í stóran mun var mannað við 16-17 ára gomlum gentum, bert einar 2-3 vóru yvir tann aldurin. Harafturímóti vóru tey yngru liðini væl mannað, serstakliga unglinga og dreingjaliðini, sum bæði gjørdust Føroyameistarar. Bert hondbóltsvøllurin í Havn var asfalteraður og eg minnist, at tá ið eg fyrstu ferð var við felagnum í Vestmanna og spældi, hevði tað regnað so illa, at mann stóð upp um øklar í vatni, tá mann skuldi kasta hornakast í niðara vestasta horni, mátti mann sikta eftir bak og síðulinjunum fyri at standa rætt. Eftir dystin vóru vit so drignir í runu, at vit fóru í ánna við síðuna av skúlanum í klæðunum at skola av okkum, tí bað fekkst ikki, tí oljufýrrúmi í skúlanum var sloktur vegna summarfrí.

Í 1966 vóru ongar deildir yngri enn tey 16 ára gomlu, men tey næstu árini vórðu fleiri og fleiri yngru settar í gongd, og serliga tá ið hallirnar komu, tók hetta dík á seg.

Í felagnum vóru fólk, ið vóru samd um at menna felagið, og at hetta gjørdist best við miðvísum ungdómsarbeiði. Hvussu hetta eydnaðist, sæst best av, hvussu ung fólk streymaðu til í hesum árunum. Í 1969 høvdu vit 6 lið við í landskappingini, í 1974 23.

Hetta skapti okkum so eitt nýtt problem: hvussu skuldu vit herberga øllum hesum fólkunum – bert ein høll var, og vit vóru 5 feløg um at deila hana – og hvaðan skuldu vit fáa fólk til at taka sær av øllum hesum ungdóminum? Limirnir vóru ungir – tað eina árið, eg sat í nevnd, var eg tann einasti yvir 16 ár í nevndini – so tað gjørdist soleiðis, at tey ungu tóku sær av teimum yngri. Og pláss skuldi skaffast, og tað fanst ikki! Mortan Mohr og eg vóru tann eina veturin venjarar hjá gentum 12 – vit høvdu 45 minuttir um vikuna í høllini á Hálsi og 2 tímar í fimleikarhøllini í Kommunuskúlanum, tann dagin, tær vóru flestar til venjingar, vóru tær 53!

Tað, at hallirnar komu rundt landið, gjørdi allan munin, og tað, at landskappingin flutti innandura, varð avgerandi. Feløgini fingu vant, sum tey áttu, og til bar nú at leggja eina kappingarskrá, sum hevði nakað uppá seg, og framburður var á øllum mótum – ikki minnst tí tað eydnaðist at fáa eina 1.deild við 8 liðum hjá monnum og 7 hjá kvinnum og eina steypakapping, sum gjørdist tað heilt stóra.

Og alt gekk framá, til samfelagið og harvið hondbólturin fór á húsagang.

Alt virksemi hjá Hondbóltssambandinum úteftir mátti halda uppat, og alt arbeiði í 90´inum snúði seg um at gjalda eina milliónaskuld aftur – nakað hondbólturin kanska er komin yvir nú aftur.

HANS HOLM



Alt vanligt innandura arbeiði verður gjørt skjótt og væl
Baldvin Baldvinsson
MÁLARAMEISTARI
Mýrisnípuvegur 18 · 100 Tórshavn
311239 / 211239
MØGULEIKAR OG LOYSNIR




effo
95
diesel
sjálvtøka
fast
Effo orkar betur
Við okkara royndum, vitan og førleikum tryggja vit orku til húsarhaldini, stovnar og vinnuna. Kring landið hava vit bensinsølustøð og Fast-handlar. Skipini bunkra hjá okkum í best útgjørda terminali í Norður-atlantshavi. Og hvørja ferð eitt flogfar lyftir seg upp frá vøllinum í Vágum, hevur tað frammanundan tikið brennievni frá okkum.
Tel 34 35 00
www.effo.fo
effo
føroya orkufelag




SAMLA MERKIR
Fontignac
SPAR UPP Í
75%
Fontignac
Føroya Keypssamtøka
Tín handil
Einans LIMIR




G-Cargo
Flutningur
Tel. 22 46 12
gdolum@gmail.com
G-Cargo

# VENJINGARTÍÐIR 2016/2017

| Kl. | Mánadag | | | | | Týsdag | | Mikudag | | Hósdag | | | | Fríggjadag | | | | Sunnud. | Kl. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | GH | GH | Hoyvik fiml. høll | Skt Skúli | Kollafj. | HH | HH | GH | GH | Sk Løgm. br | Hoyvik fiml. høll | HH | HH | GH | GH | Kollafj. | HH | GH | |
| 07.30-08.00 | | | | | | | | | | | | | | | | | | Ser-venj-ingar | 07.30-08.00 |
| 08.00-08.30 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 08.00-08.30 |
| 08.30-09.00 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 08.30-09.00 |
| 09.00-09.30 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 09.00-09.30 |
| 09.30-10.00 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 09.30-10.00 |
| 10.00-10.30 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 10.00-10.30 |
| 10.30-11.00 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 10.30-11.00 |
| 14.00-14.30 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 14.00-14.30 |
| 14.30-15.00 | | Dr12 | | | | | | | Dr12 | | | | | | | | | | 14.30-15.00 |
| 15.00-15.30 | Dr12 | | | | | | | Dr12 | | | | | | | | | | | 15.00-15.30 |
| 15.30-16.00 | | G12 (2005) | | | | G10/ Dr10 | | | | | | G10/ Dr10 | | | | | | | 15.30-16.00 |
| 16.00-16.30 | G12 (2005) | | U10 | | | | G10/ Dr10 | U8 | | | G12 | | G10 Dr10 | | | | | | 16.00-16.30 |
| 16.30-17.00 | | G12 (2004) | | | | G14 | | | G12 (2005) | U6 / MINI | | Dr14 | | | | | | | 16.30-17.00 |
| 17.00-17.30 | G12 (2004) | | G14 | | | | G14 | G12 (2005) | | | D12 | | D14 | | | | | | 17.00-17.30 |
| 17.30-18.00 | | Dr14 | | | | G17 | | | G12 (2004) | | | FTZ | | | | | G14 | | 17.30-18.00 |
| 18.00-18.30 | Dr 14 | | | | | | G17 | G12 (2004) | | | G17 | | FTZ | | | | G14 | | 18.00-18.30 |
| 18.30-19.00 | | Dr16 | | | | Hvonn | | | G14 / 17 | | | | | | | | | | 18.30-19.00 |
| 19.00-19.30 | Dr16 | | | | Hvonn / 1.d kv. | | Hvonn / 1.d kv. | G14/ G17 | | | Dr16 | Hvonn / 1.d kv. | | | | FTZ | 2.d.m | | 19.00-19.30 |
| 19.30-20.00 | | | | | | | | | Dr18/- 1.d.m | | | | Hvonn / 1.d kv. | | G17 | | | | 19.30-20.00 |
| 20.00-20.30 | | | | Dr14 | | FTZ | | Dr18 1.d.m | | | | | | G17 | | | | | 20.00-20.30 |
| 20.30-21.00 | | | | | | | FTZ | | Dr16 | | | | | | Dr18/ 1.dm | | | | 20.30-21.00 |
| 21.00-21.30 | | | | FTZ | | | | Dr16 | | | | | Dr16 | Dr18 1.d.m | | | | | 21.00-21.30 |
| 21.30-22.00 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 21.30-22.00 |
| 22.00-22.30 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 22.00-22.30 |
| 22.30-23.00 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | 22.30-23.00 |

## Venjara yvirlit kappingarárið 2016/2017

| Lið | Navn: | tlf.nr. | T-post adressa |
|---|---|---|---|
| Hvonn/1.d.kv | **Danilo Gagliardi** | 284991 | danilogjunior@hotmail.com |
| | **Eirikur Magnussen** | 214456 | eim@mylnan.fo |
| G17 | **Danilo Gagliardi** | 284991 | danilogjunior@hotmail.com |
| | **Brynja Høj** | 586911 | brynjahoj@gmail.com |
| G14 | **Danilo Gagliardi** | 284991 | danilogjunior@hotmail.com |
| G12 (2005) | **Lilja Mohr** | 581529 | liljamohr@hotmail.com |
| | **Súsanna Pálsdóttir Nolsoy** | 274762 | susannanolsoy@hotmail.com |
| G12 (2004) | **Sigrun Mikkelsen** | 210220 | sigr@av.fo |
| | **Eyðun Jensen** | 214962 | eydun@gjaldstovan.fo |
| G10 | **Katarina Høj** | 593299 | katarinahoej@live.com |
| U8 | **Jón Kragesteen** | 510449 | jonkragesteen@gmail.com |
| U6/Mini | **Siri Ann Persson** | 210180 | siriann@olivant.fo |
| | **Elsa Reinert** | 288685 | elsareinert@gmail.com |
| | **Katrin á Neystabø** | 235817 | katrin@amnesty.fo |

| Lið | Navn: | tlf.nr. | T-post adressa |
|---|---|---|---|
| FTZ | **Scott Harrington** | 251931 | scott@thehandball.academy |
| | **Ári Rouch** | 231982 | arirouch@gmail.com |
| 1.d.menn | **Scott Harrington** | 251931 | scott@thehandball.academy |
| 2.d.menn | **Karsten Hansen** | 596601 | kha@kallnet.fo |
| Dr18 | **Terji Mørk** | 250625 | terjimork@hotmail.com |
| Dr16 | **Frank Askildsen** | 260319 | frank.askildsen@icloud.com |
| | **Sjúrður Thomasen** | 280588 | sjurdurt@hotmail.com |
| Dr14 | **Hjalti í Jákupsstovu** | 269536 | h.jakupsstovu@gmail.com |
| Dr12 | **Einar Martin Hjalt Jacobsen** | 510243 | einarmartin123@gmail.com |
| | **Jóhannes Meling** | 257256 | jh3006s7@skulin.fo |
| Dr.10 | **Christopher Lorenzo Moe** | | doffen18@gmail.com |
| | | | |
| Samskipari | **Lovisa Niclasen** | 223434 | lovisa.niclasen@skulin.f |




**Eik Banki P/F**, Tel. 348000
eik@eik.fo , www.eik.fo

Eik
Tað snýr seg um teg



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | **www.liv.fo**



Reel

El-innlegging Reel
v/Regin Nolsøe Sp/f

Hákunargøta 17 · 188 Hoyvík · telefonnr. 3187 13
Fartlf. 518713 · Fartlf. 58 27 13 · reel@kallnet.fo

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

**Upplatingartíðir:**
Mána. - Fríggjadag
8:00 – 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**




**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# FØROYSKUR HONDBÓLTUR hevur eina bjarta framtíð

Seinnu árini hevur menningin í føroyskum hondbólti verið stór, møguleikarnir nógvir og mørkini fá, men enn er nógv at gera og langt á mál.











Það er ongin loyna, at HSF hevur sett sær sera stór mál. Áherðsla er løgd á tríggjar høvuðstættir. Tann ítróttarliga, tann fíggjarliga og tann umsitingarliga. Og skal tað eyðnast at flyta Føroyar fram í fremstu røð á altjóða hondbóltspallinum, mugu allir hesir tættir raðfestast høgt.

## Ítróttarligu ætlanirnar

Í HSF hava vit orðað ein yvirskipaðan ítróttarligan málsetning, sum er soljóðandi:

**Føroyskur hondbóltur skal støðugt og framhaldandi luttaka í altjóða hondbólti.**
**Vit ynskja at skapa A-landslið fyri kvinnur og menn, sum innan 2024 standa seg í altjóða topphondbólti, t.v.s eru millum 24 tey bestu í Evropa.**
**Leikararnir skulu verða skjótir og flytførir bæði í verju og álopi.**
**Verjuspælið skal verða álopskent, og álopsspælið ágangandi.**
**Vit skulu spæla við nógvari ferð við áherðslu á evnunum hjá tí einstaka**

## Føroyski leisturin

Skal hesin málsetningurin røkkast, mugu vit arbeiða á nógvum ymiskum mótum. Fyrst og fremst mugu vit vita, hvussu vit vilja spæla, og hvussu vit framleiða leikarar, sum megna uppgávuna.

Vit eru í ferð við at framleiða ein sokallaðan „føroyskan leist". Við øðrum orðum vilja vit lýsa ein hátt at framleiða leikarar, sum eru førir fyri at røkka yvirskipaða málsetninginum.

## Føroyska venjaraútbúgvingin

Afturat menningarleistinum og leikaratilfeinginum er umráðandi at førleikamenna venjarar, at miðla lærdómin.

Vit hava í dag eina føroyska venjaraútbúgving, sum byggir á ymisk grundmodul. Til miðnám á venjaraleiðini hava vit regluligar skeiðsvitjanir við útlendskum vegleiðarum, og samstundis ferðast føroyskir venjarar uttanlands at taka hægru venjaraútbúgvingarnar.

Í næstum verður ein heildarætlan gjørd fyri útbúgvingarøki. Tað skal framganga greitt og einfalt á heimasíðu HSF´s, hvør leiðin í venjaraútbúgvingini er. Samstundis skal „føroyski leisturin" síggjast aftur í undirvísingartilfarinum.

## Leikaramenningin

Ein høvuðstættur í menningini av føroyskum hondbólti er leikaramenningin. Vit fara nú undir 4. árið við leikaramenning. Støðugt hava vit eftirmett leistin og innihaldið. Skipanin, sum verður galdandi kappingarárið 2016/17 verður bæði greiðari og innihaldsliga betri kjølfest, nú vit hava „føroyska leistin" at hella okkum til.

## Landsliðini

Seinastu tvey árini hava øll landsliðini verið virkin. Vit hava luttikið í øllum teimum stóru kappingunum, eins og vit hava luttikið í ymiskum kappingum fyri menningarlond í hondbólti, og sigast má, at úrslitini hava verið góð. Menningarkappingarnar vinna vit allar, og heilar tríggjar ferðir hava vit verið nær við at fáa eitt ungdómslandslið í sjálvt EM-endaspælið.

## Evropa cup luttøka

Vit síggja nú eisini, at feløgini í størri og størri mun aftur ynskja at luttaka í evropeisku kappingunum. Í ár hevur Neistin valt, at kvinnuliðið, sum vann greipuna seinasta ár, skal luttaka í EHF kappingini. Ítróttarliga er evropeisk luttøka mennandi fyri feløgini, men fíggjarliga er tað ein stórur biti. Ynskiligt er, við tíðini, at HSF og feløgini saman, kunnu gera eina skipan, sum stuðlar undir evropeiska luttøku hjá feløgunum.

## Vakstrarøkir

Enn eru øki í Føroyum, har vakstarmøguleikarnir í hondbólti eru stórir. Kappingin við aðrar ítróttargreinar er kanska serliga stór í t.d Klaksvík, Runavík, í Suðri og í Vágunum.

Tað er ynski og ætlanin hjá HSF á ymiskan hátt at stuðla undir og saman við feløgunum at skapa veruligar orkudeplar fyri hondbólt kring alt landið.

## Heimligu kappingarnar

Nú vit arbeiða við at økja og styrka leikaramenningina og landsliðini, er tað sera umráðandi at vit ikki gloyma heimligu kappingarnar. Tí arbeiðir HSF framhaldandi við at styrkja og betra heimligu kappingarnar bæði hjá teimum eldru og yngru. Umráðandi er, at hava kappingar, sum eru spennandi, stuttligar og eggja leikararnar framhaldandi at venja hart og miðvíst.

## Fíggjarliga avbjóðingin

Skulu vit røkka ítróttarligu málunum, má fíggjarliga grundarlagið vera til staðar. Vit hava mett, at vit í løtuni kunnu reka føroyskan hondbólt fyri uml. 5 mió árliga.

Í høvuðsheitinum eru tað fýra inntøkukeldur. Privatir sponsorar, veddingarpengar, tað vit sjálvi skapa og so almennur stuðul.

Ætlanin er, at umleið helvtin av fíggingini, ella 50% skal koma frá privatum sponsorum. Tá tosa vit bæði um heimligu kappingarnar, hvonn- og FTZ-deildina, og Coca Cola-steypakappingina, og landsliðini, sum í dag vera stuðlaði av Bank Nordik, Atlantic Airways, Marine Harvest, Varðanum Pelagic, Faroe Ship og Magn. Veddingarpengarnir skulu helst fíggja minst 25 %, meðan áskoðarainntøkur og onnur eginfígging skal fíggja uml. 15%. Seinastu 10-15 % vóna vit at fáa í almennum stuðli.

Enn er nakað á mál á fíggjarliga økinum, men vit arbeiða hart og miðvíst fyri at styrkja fíggjarliga grundarlagið undir HSF.

## Umsitingin og nevndirnar

Til tess at lyfta ymisku uppgávurnar, bæði tær ítróttarligu og tær fíggjarligu, mugu vit hava nokk av hondum. Í dag eru tvey fulltíðarstørv í umsitingini hjá HSF.

Saman við Starvsnevndini hjá HSF og ymisku undirnevndunum, er tað uppgávan hjá umsitingini at lyfta uppgávurnar, sum eru í tí dagliga. HSF er feløgini, og tí er tað avgerðandi, at feløgini hava álit á arbeiðinum, sum verður gjørt í HSF, og samstundis ynskja vit eitt opið umhvørvi, har feløgini kenna seg hoyrd og vird.

At enda vil eg ynskja Neistakvinnunum góða eydnu.

GUNN ELLEFSEN
forkvinna í HSF


GER DREYM
TIL VERULEIKA
Nýtt blað er ávegis við hópin av góðum tilboðum
– støkk inn á gólvið og fá eitt baðirúmsprát
DANSANI®
Maria Poulsen Baðirúm
Smyrilsvegur 8 | 100 Tórshavn | Tel 359 115 | ej@mp.fo | www.mp.fo


Hvønn velur tú?
Við Gullpakka
uttan verkstaðsrokningar
Uttan Gullpakka
við verkstaðsrokningum
GULLPAKKIN
Auto Service
Við Gullpakkanum sleppur tú undan óvæntaðum verkstaðsrokningum
Og hann er gull verdur, tí við honum sleppur tú undan, tey fyrstu 3 árini ella upp til 90.000 km, at gjalda fyri árligt og hálvárligt eftirlit, umvælingar, eykalutir til bilin, viðlíkahald og skift av bremsum, olju, løgir og skift, perur og skift, viskarar og skift, sprinklaraløg og áfylling, filtur og skift og tøkniligar dagføringar við arbeiðsløn. Tað besta av øllum er, at við Gullpakkanum tryggjar tú tær tað hægsta søluvirðið, um bilurin skal seljast aftur.
Gullpakkin er ikki galdandi fyri virkisbilar, vørubilar og hýruvognar. Sí treytir á autoservice.fo.
NISSAN
PEUGEOT
OPEL
www.autoservice.fo undir Krákugjógv 19 Tórshavn Tel. 34 54 00
Auto Service

# Ein familja eitt hald

Nú bjóðar **Vodafone** EITT hald, ið fevnir um alla familjuna. Stór og smá. Ung og gomul. Haldið kann víðkast eftir tørvi, við meira dáta og meira reiking fyri lítið og lætt.

Stovna títt familjuhald á **vodafone.fo** ella ring 202020, og lat okkum gera tað fyri teg.




Fyri at fáa RED Familju, skulu øll hava sama bústað. Navn og føðidato skal skrásetast fyri hvønn einstakan í húskinum. Upp til 10 fólk kunnu vera í einum familjuhaldi. Fría talan og sms er ikki galdandi til yvirtakseraðar tænastur so sum V4 og nummarkall. Les meira um treytirnar á www.vodafone.fo

el | net

Tlf 60 00 60 • Fax 60 00 61

góðkent elinnleggjaravirki

El|net

Tlf. 606060 | elnet@net.fo

TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



SENDISTOVAN

ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

Í samband við Evropa Cup luttøku hjá Neistakvinnum og innliman fyri allar Neistaleikarar komandi kappingarár, verður Torgið í SMS karmur um hettar átak

# Neistadagar, limadagar og Sportigan

## Á TORGINUM Í SMS

## Á Torginum verður:

**Innliman:** (til ber at gjalda við gjaldskorti hendan dagin)

Allir Neistaleikarar komandi kappingarár innlima seg hesar dagar, og gjalda somuleiðis limagjald:

Limagjaldið komandi kappingarár er:

| | |
|---|---|
| **U6/mini** | kr. 500,- |
| **U8 (1 og 2 flokkur)** | kr. 650,- |
| **U10 og U12** | kr. 1.000,- |
| **U14 og eldri** | kr. 1.200,- |
| **Hvílandi limur** | kr. 500,- |

**AVSLÁTTUR:**
Um foreldur hava fleiri børn í Neistanum undir U18, rindar fyrsta barnið fullan prís, og síðan verður avsláttur á 20% latin fyri hvørt eyka barnið.

**TOMBOLA:**
Tombola verður á Torginum báðar dagar

**SPØL OG SPURNARKAPPINGAR**
Ymisk spøl við bólti, javnvág og nærlagni verða at royna, umframt spurnarkappingar

# FRÍGGJADAGIN 9.SEPTEMBER
frá kl. 10.00 til 19.00

og

# LEYGARDAGIN 10.SEPTEMBER
frá kl.10.00 til 18.00




Hondbóltar á Torginum

-20%

## SPORTIGAN

Neistadraktin, T-shirt og hondbóltur kan keypast við avsláttri hesar dagar





**KOSTNAÐUR:**

**Vaksin kr. 600,-** (kr. 749,- vanligt)
**Børn kr. 550,-** (kr. 699,- vanligt)

**T-shirtin á Torginum kr. 199,-**
(kr. 249,- vanligt)


Húsavarðartænastan
15 ár
2001 - 2016
Ogna tær tín egna húsavørð
- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð
sansir.fo
Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.
Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.
Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.
Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.
Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.
Reinsa við turr-ísi
Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing. Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.
Betong-saging
ICS
Við okkara Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm. Ring og hoyr nærri.
Húsavarðartænastan Spf
Postboks 1032 | Traðartún 1 | 160 Argir
hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29
Húsavarðartænastan

















PLÁTUVERKSTAÐIÐ

Nordcar P/F Wenzel Norðbil

# Vit umvæla allar bilskaðar – skjótt og væl



Vit umvæla øll bilmerki

## Umboðandi verkstaður fyri Nordcar og Norðbil


Verkstaður

Á verkstaðinum átaka vit okkum allar umvælingar uppgávur. Vit hava dugnalig starvsfólk til allar tær ymisku uppgávurnar. Vit hava alla tað útgerð ið krevst fyri, at umvælingarnar skulu verða gjørdar til fulnar. Vit umvæla eisini lastbilar.


Lakkering

Fyri at verja umhvørvi, nýta vit bert vatnbasera lakk fra Spice Hecker. Og vit eru altíð til dystin fús, um tað snýr seg um onkra meira óvanliga lakkerings uppgávu. Eitt nú hava vit lakkerað lastbilar, tangabilar og aðrar stórar lutir.

Sp/f Plátuverkstaðið v/Glenn Perdomo · Tel 321778 / 221778 · platuverk@gmail.com




# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna.
Viðgerðartryggingin tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum. Tryggingin veitir tær m.a. viðgerð hjá fysioterapeuti, kiropraktori, sálarfrøðingi o.s.fr. Harumframt skurðviðgerð á privatsjúkrahúsinum hjá Mølholm Forsikring.

**Set teg í samband við okkum á tel 345 600 ella tf@trygging.fo og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR